


www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 10 - 2011

# Offshoremessa tvær ferðir so nógv vitjandi

Áhugin fyri Offshore Technology Days-messuni í Stavanger í síðstu viku var sera stórur. Næstan 21.000 fólk stukku inn á gólvið, og tað var næstan tvær ferðir fleiri enn í fjør, tá messan var í Bergen. Hetta er fyrstu ferð, at OTD-messan hevur verið í Stavanger, og orsøkin er, at tann stóra Arenum-messuhøllin í Bergen skuldi takast niður. Tey, sum fyrireika messuna, eru sera væl nøgd. Framsýnararnir vóru 328 í tali ímóti 210 í fjør, og fleiri fyritøkur, sum ongantíð hava verið á messuni í Bergen, vóru við í ár. Eitt annað jaligt úrslit var sambært Stavanger Aftenblad, at nógv ungfólk vóru á messuni hesaferð. 2.525 tóku av Young professionals-tilboðnum fyri studentar og nýútbúgvin , og tað var millum fýra og fimm ferðir fleiri enn í Bergen í fjør.